Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Samskipari søkist

Sjálvstøðugt og avbjóðandi starv hjá Bláa Krossi Føroya.

Vit sóknast eftir einum sjálvstøðugum og ágrýtnum starvsfelaga, sum kann arbeiða á ymiskum økjum og vera við til at menna felagsskap okkara.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**
• Samskipa og standa fyri ymiskum verkætlanum, serliga innan fyribyrgingarøkið.
• Standa fyri og leggja til rættis kunningararbeiðið hjá Bláa Krossi.
• Menna sjálvbodna arbeiðið hjá Bláa Krossi.
• Saman við aðalskrivaranum tryggja fíggjarliga grundarlagið hjá felagsskapinum.
• Hjálpa til við fyrifallandi uppgávum.

**Førleiki:**
• Tú ert væl skipað/ur og hevur gott yvirlit, hóast nógvir bóltar eru í luftini ísenn. Tær dámar at arbeiða saman við øðrum, men kanst eisini arbeiða sjálvsstøðugt og leggja tín egna arbeiðsdag til rættis.
• Vit roknað við at tú hevur eina hóskandi útbúgving ella royndir á økjunum.
• Tú dugir væl føroyskt og hevur hollan teldukunnleika.
• Royndir frá verkætlanararbeiði og/ella fjølmiðlaøkinum er ein fyrimunur, men eingin treyt.
• Tú tekur undir við grundarlagnum hjá Bláa Krossi og vilt arbeiða samsvarandi hesum.

Tú verður ein partur av toyminum á skrivstovuni í Runavík og kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á skrivstovuni. Talan er um fulltíðarstarv, men kann parttíðarstarv eisini koma uppá tal. Góðir møguleikar eru fyri persónligari og fakligari menning. Lønar- og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Vit skulu hava umsókn tína seinast fríggjadagin 25. januar. Starvið verður sett skjótast til ber.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Hjalmar á tlf. 748894 ella senda teldupost til hjalmar@blakross.fo. Umsókn skal sendast til:

**Blái Krossur Føroya**
Heiðavegur 6
620 Runavík.

FØROYA HANDILSSKÚLI




**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 317177
Telefax 313374

**Heimasíða skúlans:**
**www.fh.fo**

# Føroya Handilsskúli søkir eftir lærara

at undirvísa í systemmenning hjá teldustøðingum

**Um Teldustøðinga útbúgvingina:**
Teldustøðinga útbúgvingin er sonevnd styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2¼ ár.

Útbúgvingin fevnur í høvuðsheitum um: systemmenning, forritan, tøkni og virkið. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virkið eru ætlaði at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein og høvuðsuppgáva.

Nærri kunning um teldustøðing er á heimasíðu skúlans: www.fh.fo

**Um starvið**:
Talan er um parttíðarstarv, sum í ein ávísan mun kann lagast til møguligar aðrar uppgávur hjá tí, sum sett/-ur verður. Tey lesandi fara undir 4. lestrarhálvu í februar 2008 og hevur undirvísing í systemmenning eisini verið á útbúgvingini higartil.

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í fakøkinum systemmenning (systemudvikling)
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur innan fakøkið

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum hevur áhuga í undirvísing dugir væl at samstarva og samskifta
- tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað, men eru møguleikar fyri framhaldandi starvið.
Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn.
Lærarar á Teldustøðinga útbúgvingini verða løntir smb. avtalu.

**Starvið er leyst til setan 1. februar 2007 ella skjótast til ber.**

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn.
Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 14. januar 2008**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á telefon 317177, teldupostur: ***alk@hsh.fo.***

***Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 næmingar á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðing, HD og akademiútbúgving. Teldustøðinga útbúgvingin er skipað sum fulltíðarlestur í 2¼.***

# Urtagarðsrøkt

Um nóg nógv tekna seg verður 20 t skeið í urtagarðsrøkt v.m. **mikukvøld kl. 19.00 - 20.40.**

**Byrjað verður 16. januar.**

Lærari: Jóan Petur Berg, tlf. 444290 / 737722

Kostnaður: 200 kr.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**

**Tlf. 737760**

# Matstova í Klaksvík til leigu/sølu

Væl innarbeidd matstova, fult útgjørd við øllum loyvum, ið krevjast, er til leigu/sølu.

Matstovan heldur til í leigaðum bygningi.

Møgulig yvirtøka kann fara fram eftir avtalu.

**Áhugaði kunnu ringja tlf. 21 64 34.**

# Bilførari søkist

Søkt verður eftir bilførara.
Skal hava stóra koyrikortið.

**H.H. Trans Sp/f · 212708**

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við